# Verkfall um smápengar

*Í gjár vóru báðir partar í verkfallinum í Kollafirði so rørandi samdir um, at tað var so lítið, sum skilti, at tað er bæði synd og skomm at halda fram við verkfallinum*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Nú hevur verkfallið í Kollafirði skjótt vart í tríggjar vikur. í farnu viku var fundur í Kollafirði fyri dagrøktarmammur úr øllum landinum og tær lýsti starvsfeløgum sínum fullan stuðul. Mynd: J.Kr. Vang*

Semingsroyndirnar, sum skuldi fáa ein enda á tí skjótt tríggjar viku langa verkfallinum hjá dagrøktarmammunum í Kollafirði, kortsluttaðu heldur óvæntað um vikuskiftið.

Men bæði Miriann Dam, talskvinna hjá dagrøktarmammunum, og Hans Jacob Hansen, bygdaráðsformaður í Kollafirði, eru so rørandi samd um, at nú er tað so lítið, sum skilir partarnar, at tað er bæði synd og skomm at halda fram við verkfallinum.

Annars høvdu samráðingarnar um vikuskiftið ført til semju á næstan øllum økjum og sáttmálin var komin undir land.

Semja var bæði gjørd um lønir, eftirlønir, arbeiðstíðir, starvsaldur og um, nær sáttmálin skuldi koma í gildið og, hvussu leingi, hann skuldi vera í gildið.

Partarnir eru samdir um, at sáttmálin skal koma í gildið 1. august og fara úr gildi aftur 31. desember.

Tá leggur Kollafjørður saman við Tórshavnar Kommunu og Kollafjarðar Kommuna sigur, at hon hevur ikki heimild at gera sáttmála, sum gongur longur enn til nýggjárs, tí tá yvirtekur Tórshavnar Kommuna málið.

Bygdaráðið hevur eisini tvíhildið um at lønarlagið hjá dagrøktarmammunum skal vera á sama støði sum í Havn.

Tað vil siga, at dagrøktarmammurnar skulu fáa einar 700 krónur meiri fyri at hava tey smærru børnini undir trý ár, enn tær skulu fáa fyri at hava tey størru børnini.

Hinvegin vildi dagrøktarmammurnar hava tað sama í løn fyri øll børnini, og tað skuldi vera miðallønin av tí, sum mammurnar í Havnini fáa.

–Í hesari trætuni var skorið mitt ígjøgnum, so at vit nú fáa gott 3.000 krónur fyri tey minnu børnini og knapt 3.000 fyri tey størri børnini, so at munurin er góðar 300 krónur, sigur Miriann Dam.

### Ósemja um gestabørn

Tað einasta, sum ósemja nú er um, og sum heldur lív í verkfallinum, er, hvørja løn dagrøktarmammurnar skulu hava fyri gestabørnini.

Gestabørn eru børn, sum ein dagrøktarmamma hevur fyri eina aðra, sum hevur forfall av ymsum orsøkum.

–Kommunan tvíheldur um, at dagrøktarmamman, sum hevur forfall, skal missa eftirlønina fyri børnini, hon skuldi havt.

– Men hinvegin skal dagrøktarmamman, sum skal hava hesi gestabørnini, ikki fáa eftirlønina.

– Og vit kunnu undir ongum umstøðum góðtaka, at ein dagrøktarmamma skal fáa minni fyri at hava eitt gestabarn, enn hon fær fyri tey børnini, hon vanliga hevur, sigur Miriann Dam.

Hans Jacob Hansen, bygdaráðsformaður í Kollafirði, heldur, at ósemja er eisini um, hvat eitt gestabarn er.

– Kommunan uppfatar eitt gestabarn, sum ein dagrøktarmamma hevur nakrar fáa dagar, fyri eina mammu, sum hevur forfall av onkrum orsøkum.

–Hinvegin uppfata dagrøktarmammurnar tað eisini sum gestabørn, tá ið ein dagrøktarmamma hevur børn fyri eina aðra, sum er í barnsburðarfarloyvi í eitt hálvt ár, men tað halda vit er burturvið.

### Bæði synd og skomm

Bæði bygdaráðsformaðurin og talskvinnan hjá dagrøktarmammunum eru tó samd um, at í pengum er hetta eitt so lítið mál, at tað er bæði synd og skomm at verkfallið skal halda fram av hesi orsøk.

Og báðir partar vóna, at nakað hendir í málinum skjótt.

Men tey bæði, Miriann Dam og Hans Jacob Hansen, eru ikki samd um, hvør eigur at næsta útspæl.

– Bólturin liggur hjá Kommununi, sigur Miriann Dam.

– Tað eru ikki vit, sum hava slitið semingsroyndirnar, sigur hans Jacob Hansen.

Í gjáramorgunin visti sostatt ongin hvat fór at henda og, nær, nakað hendi.

Og tískil heldur verkfallið fram.

Fyribils er alt arbeiði, sum limir í Føroya Arbeiðarafelag gera fyri Kollafjarðar Kommunu, lagt lamið. Tað ber m.a. í sær, at skúlin verður ikki vaskaður og mitt í síðstu viku, var hann so skitin, at undirvísingin mátti halda uppat og børnini vórðu send til hús.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at hendir onki heilt skjótt, má støða takast til, um onnur stig skulu takast fyri at leggja Kollafjarðar Kommunu undir trýst.

# Vit sleppa við skrekkinum

*Hóast oljuprísirnir eru í hæddini, fer hetta ikki at noyða SEV at hækka streymprísin*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað verður ikki neyðugt hjá SEV at hækka prísin á streymi, hóast prísurin á olju er farin til himmals.

Sostatt sleppa brúkararnir hjá SEV við skrekkinum, hóast útreiðslurnar hjá SEV til olju næsta ár eru tvífaldaðar afturímóti 1998.

SEV brúkar rættiliga nógva olju til at reka elverkini við og tí hevur verið fryktandi fyri, at teir methøgu oljuprísirnir eisini fóru at føra til, at SEV fór at hækka SEV prísirnar.

John Danielsen, fíggjarleiðari hjá SEV, sigur, at SEV hevði væntað høgar oljuprísir.

Men kortini eru prísirnir hægri enn mett var á fíggjarætlanini.

Fíggjarætlanin hjá SEV fyri komandi ár varð løgd longu í mai mánaða í ár.

– Komandi ár høvdu vit væntað at brúka 38,4 milliónir til olju komandi ár.

– Men sum prísirnir eru nú, verða útreiðslurnar til olju einar átta milliónir hægri, ella einar 46 milliónir komandi ár.

Hetta verður tvær ferðir so nógv sum SEV brúkti til olju í 1998, tá ið hesar útreiðslurnar vóru 23,3 milliónir.

Í fjør brúkti SEV 25,5 milliónir til olju og í ár verða oljuútreiðslurnar upp á 40 milliónir.

### Lækkaðir hvørt ár

Men fíggjarleiðarin hjá SEV sigur, at hinvegin verður streymprísurin ávirkaður av oljuprísinum á tann hátt, at nú fer tað neyvan heldur at bera til at lækka prísin.

– Sostatt fer oljuprísurin at ávirka prísin í longdini, tí hann fer ikki at vera so lágur, sum hann annars kundi verið.

– Annars hava vit lækkað prísirnar hvørt ár tey seinastu árini. Men næsta ár hava vit gjørt av at varðveita somu prísir sum í ár, og sostatt lækka teir ikki komandi ár.

Fíggjarleiðarin sigur, at hann væntar ikki, at sum oljuprísurin er í løtuni, fer tað at gera tað neyðugt at hækka streymprísin.

–Hinvegin fer tað sjálvsagt at gera ársúrslitið hjá SEV verri enn væntað.

Men tað hevur SEV eisini rúm fyri, tí næsta ár er mett at SEV fór at hava 16 milliónir í rakstraravlopi. Sostatt hevur felagið eitt sindur av luft og teir

Teir hækkandi oljuprísirnir fara sostatt „bara“ at føra til sær, at avlopið fer at lækka niður í einar átta milliónir komandi ár.

Í ár fer roknskapurin hjá SEV akkurát at javnviga, tað kemur partvís av tí høga oljuprísinum. Men tað kemur eisini av, at SEV hevur havt óvanligar útreiðslur í ár av at skifta rørini til elverkið í Botni í Suðuroy út.



*Fíggjarstøðan hjá SEV er so mikið góð, at tað verður ikki neyðugt at hækka streymprísin, hóast oljuprísirnir eru farnir í topp*



# Vil hava tollfría sølu í Vágum

*Jákup Sverri Kass, tingmaður, fer á tingfundinum í dag at seta landsstýrismonnunum í vinnumálum og í fíggjarmálum fyrispurningar um tollfría sølu í Vágum*



*Jákup Sverri Kass heldur, at tollfrí søla á flogvøllinum í Vágum kann skapa grundarlag fyri fleiri arbeiðsplássum*

JOHN JOHANNESSEN

Tollfrí søla á flogvøllinum í Vágum hevur við sær størri umsetning og nýggj arbeiðspláss.

Hetta heldur Jákup Sverri Kass, tingmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, sum á tingfundinum í dag fer at seta Bjarna Djurholm, landsstýrismanni í vinnumálum, og Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, fyrispurning um útlitini fyri tollfríari sølu á flogvøllinum.

Jákup Sverri Kass vísir á, at sølan av tollfríum vørum hjá londunum uttan fyri ES er vaksin munandi síðani londini innan ES fyri skjótt tveimum árum síðani góvust at selja tollfríar vørur.

Sum dømi nevnir hann, at umsetningurin av tollfríum vørum á flogvøllinum í Noreg, sum er uttan fyri ES, er fleirfaldaður, somuleiðis sum fleiri arbeiðspláss eru komin á staðnum.

### Má byggjast út

Jákup Sverri Kass ásannar, at flogvøllurin í Vágum má byggjast út, skal tað bera til at hava tollfría sølu. Tí spyr hann landsstýrismannin í Vinnumálum, um tað verður arbeitt við uppfylla fysisku karmarnar og nær tað kann væntast, at høli eru klár.

Harafturar spyr Jákup Sverri Kass Bjarna Djurholm, hvørjar arbeiðsmaknaðarligar vansar og fyrimunir landstýrismaðurin í vinnumálum sær í, at farið verður undir eina tílíka sølu.

Til seinast vil Jákup Sverri Kass hava at vita, um fullveldissamráðingarnar eru nøkur forðing fyri, at farast kann undir at selja tollfríar vørur á flogvøllinum.

### Má broyta tollógina

Tingmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum stílar eisini tríggjar spurningar um sama mál til landsstýrismannin í Fíggjarmálum, Karsten Hansen.

Jákup Sverri Kass vil hava at vita frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, um arbeitt verður við at tillaga tolllógina soleiðis, at fólk kunnu keypa tollfríar vørur á flogvøllinum. Harafturat vil tingmaðurin hava at vita, nær hesir karmar verða til staðar.

At enda spyr Jákup Sverri Kass landsstýrismannin í fíggjarmálum, hvørjar landsbúskaparligar vansar og fyrimunir hann sær í, at farið verður undir tollfría sølu í Vágum.

Jákup Sverri Kass roknar við, at tollfrí søla á flogvøllinum í Vágum fer at hava við sær, at sølan umborð á flogførunum minkar.

Men hetta, heldur hann, verður uppvigað av, at fólk fara at leggja meira pening eftir sær á flogvøllinum

# Fyrsti tingfundur uttan fyri tinghúsið

*Tingfundurin í útvarpshøllini í dag verður tann fyrsti, sum er hildin uttan fyri tinghúsið, síðani tað varð bygt í 1856*

JOHN JOHANNESSEN

Í dag er tingfundur, men tinghúsið verður tómt.

Síðani tinghúsið var liðugt bygt í 1856 eru allir tingfundir hildnir har. Tingfundurin í dag verður harafturímóti hildin í útvarpshøllini.

Orsøkin tilhetta er, at tinghúsið í løtuni verður bygt um í so stóran mun, at tað ikki ber til at halda tingfundir har, meðan umbyggingin fer fram.

Í 1907 varð tinghúsið eisini bygt um. Tá bar heldur ikki til at halda tingfund í tinghúsinum.

Avleiðingin av hesum var, at eingin tingfundur varð hidin frá september mánaði í 1906 til á ólavsøku í 1907. Tá tók nevniliga einki átrokandi mál seg upp, ið gjørdi, at tað var neyðugt at halda tingfund meðan húsið varð bygt um.

Í 1977 varð tinghúsið aftur bygt um, og tá varð eingin tingfundur hildin frá hálvum september til hálvan desember.

### Eykajáttanin má góðkennast

Orsøkin til, at tingið kemur saman í útvarpshøllini í dag er, at tað er neyðugt at fáa samtykta eina eykajáttanarlóg fyri september.

Nýggja játtanarskipanin, sum kom í gildi við seinastu fíggjarlóg, krevur nevniliga, at óvæntar lógarbundnar útreiðslur fáa eykajáttan í tinginum, áðrenn tær verða goldnar.



*Tingfundurin, sum verður hildin í útvarpshøllini í dag, er tann fyrsti, sum nakrantíð er hildin uttan fyri tinghúsið*

Almanna- og Heilsumálastýrið krevur 40 milliónir eyka til lógarbundnar útreiðslur, og tí fer Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum í dag at leggja fyri tingið eitt eykajáttanaruppskot fyri september.

Eykajáttanaruppskotið hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum ljóðar tó á heilar 50 milliónir krónur. Orsøkin til hetta er, at millum annað Strandfaraskip Landsins hava fingið óvæntaðar útreiðslur.

### Müllers pakkhús var tingsalur

Tá løgtingið varð endurreist í 1852, varð tingið tey fyrstu árini hildið í gomlu tingstovuni í Gongini, sum varð bygd í 1692, og sum hevði hýst tinginum, til løgtingið varð niðurlagt í 1816.

Longu í fyrstu tingsetuni samtykti tingið at byggja nýtt tinghús í Húsabøi, og her stendur tinghúsið enn. Húsið, ið var liðugt í 1856, varð bygt úr timbri og hevði flagtak.

Húsini í Gongini vórðu seld til H. C. Müller, sýslumann, og var har nú norðasti endi av Müllers húsi er, har Landsbanki Føroya nú heldur til.

### Fýra mál

Fyri tingfundin, sum verður settur klokkan hálvgum tvey í dag, eru fýra mál á skránni. Tríggir fyrispurningar verða svaraðir, og síðani er framløga á skránni. Tá verður eykajáttanaruppskotið lagt fram.

Fyrsti fyrispurningurin, ið verður svaraður, er ein fyrispurningur frá Mamy Dahl Sørensen, sum hevur verið eykafólk á tingi fyri Javnaðarflokkin. Fyrispurningurin snýr seg um samferðsluviðurskiftini í Kalsoynni og er stílaður til Finnboga Arge, sum var landsstýrismaður í vinnu – og samferðslumálum, tá fyrispurningurin varð settur.

Tað verður kortini nýggi landsstýrismaður við hesum málsøkjum, Bjarni Djurholm, ið fer at svara fyrispurninginum.

Næsta fyrispurningunum skal Anfinn Kallsberg, løgmaður, svara. Talan er um ein fyrispurning, sum Lisbeth. L. Petersen, tingkvinna, hevur sett honum um setan av nevnd til at leggja til rættis tiltøk fyri at økja lut kvinnunar í politisku støðutakanini.

Triðji fyrispurningurin er, eins og tann fyrsti, stílaður til Finnboga Arge. Talan er um fyrispurning frá Flemmingi Mikkelsen um vegagerðina millum Øravík og Hov og nýggja samferðsluhavn í Suðuroynni.

Hesum fyrispurnigi fer Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, at svara.

Tingfundurin í dag verður helst ikki tann seinasti, ið verður hildin í útvarpshøllini. Tað er nevniliga umráðandi at fáa samtykt eykajáttanaruppskotið fyri september. Tí kemur tingið helst skjótt saman aftur í útvarpshøllini at viðgera hetta uppskot.

